FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

J.Nr.: 19/00431-2

Svar uppá spurning nr. 20/2019 eftir § 52a í tingskipanini

Spurningur frá Terja B. Vestergaard, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Fjøruvegin í Runavík.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja málið: løgtingsmál nr. 142/2018: Uppskot til løgtingslóg um nýggjan Fjøruveg í Runavík, fram á ting av nýggjum?
2. Um ikki, hvussu ætlar landsstýrismaðurin at loysa avbjóðingina við innkomuvegnum í Runavík?
3. Hvussu nógvan pening ætlar landsstýrismaðurin at seta av til verkætlanina á fíggjarlógini 2020 og tey næstu árini?
4. Hvat metir landsstýrismaðurin, at samlaði kostnaðurin verður fyri landskassan av samlaðu verkætlanini?
5. Ætlar landsstýrismaðurin at javnseta kommunurnar báðu megin tunnilsmunnarnar viðvíkjandi almenna partinum?
6. Nær kann hugsast, at arbeiðið byrjar?

Svar:
Endamálið við løgtingsmáli nr. 142/2018 var at útvega eina materiella heimild til at fara undir arbeiðið við Fjøruvegnum. Í viðmerkingum frá Fíggjarmálaráðnum varð tó víst á, at verkætlanin var ikki nóg væl fyrireikað, og at málið ikki var búgvið til at verða lagt fyri Løgtingið. Fíggjarmálaráðið vísti í hesum sambandi á, at tá ið talan er um nýgerð av landsvegum, skal projektuppskot fyriliggja, áðrenn verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið. Havandi hetta í huga, verður uppskotið tí neyvan lagt fram aftur í óbroyttum líki.

Landsstýrið arbeiðir við at raðfesta løgur innanfyri langtíðar løgukarmin og verður landsins partur av kostnaðinum í sambandi við Fjøruvegin partur av hesi raðfesting. Áðrenn komið er á mál við hesum arbeiði ber ikki til at siga, hvussu nógv ætlanin er at seta av til verkætlanina í 2020 og tey næstu árini.

Áðrenn verkætlanin er projekterað og avgerð er tikin um, hvør endaliga loysnin verður, ber heldur ikki til at siga, hvat samlaði kostnaðurin verður fyri landskassan, ella nær arbeiðið byrjar.

Hvussu kostnaðarbýtið verður millum land og kommunur er heldur ikki greitt enn, men hetta kemur helst m.a. at verða grundað á, hvussu verkætlanin verður sett saman av tilmælum frá Landsverki og ynskjum frá kommununum um broytingar í mun til hesi.

Tinganes, 25. november 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum